# ítróttur

Nr. 217 • fríggjadagur • 12. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Altjóða dystir king alt landið

**UEFA samtykti mikudagin, at tað nú skal verða loyvt at spæla Europa Cup og landsdystir á graslíkisvallum**

ALTJÓÐA LEIKVALLIR
*Jóannes Hansen*



Tað hevur leingi verið tosað um tað, og nú er tað vorðið veruleiki. Á sumri í 2005 verður tað loyvt at spæla altjóða fótbóltsdystir á graslíkisvallum. Tað samtykti aðalnevndin í europeiska fótbóltssamtakinum, UEFA, á fundi í Wien mikudagin. Samtyktin varð gjørd eftir tilmæli frá tekniskari nevnd, sum hevur arbeitt við hesum spurninginum seinastu tvey árini.

– Samtyktin hevur við sær, at tað næsta summar fer at bera til at spæla Europa Cup dystir og landsdystir - eisini EM og HM undankappingardystir - á fleiri av graslíkisvallunum kring landið. Í fyrireikingunum til hesa broytingina hevur verið tosað um triðja ættarliðið av graslíkisvallum. Tá verður eitt nú sipað til graslíkisvallirnar, sum trý tey seinastu árini eru lagdir á nógva staðni kring landið.

*– Samtyktin hevur við sær, at tað næsta summar fer at bera til at spæla Europa Cup dystir og landsdystir á fleiri av graslíkisvallunum kring landið, sigur Rúni Heinesen*

Hetta sigur Rúni Heinesen frá Fótbóltssambandi Føroya. Hann hevur tvey tey seinastu árini vegna FSF luttikið í norðurlendskum samstarvi um júst henda spurningin. Bólkurin vitjaði í Føroyum eina ferð í summar. Í tekniska bólkinum hjá UEFA, ið hevði gjørt tilmælið, sum aðalnevndin mikudagin samtykti, hava verið ein svii og ein norðmaður. Hesir báðir hava eisini luttikið í norðurlendska samstarvinum, so samtyktin, sum nú er gjørd í UEFA, kemur ikki óvart á Rúna Heinesen og Fótbóltssambandið.

– Eg rokni ikki við, at tað verða nakrir trupulleikar at góðkenna nógvar av nýggju graslíkisvallunum kring landið at spæla altjóða dystir á. Góðkenningin verður eitt nú grundað á mátingar av, hvussu bólturin háttar sær á vallunum. Tá skulu ásett tøl og virði uppfyllast, men hetta verður neyvan nakar trupulleiki. Spurningurin verður heldur, hvussu tað fer at eydnast at fáa aðrar umstøður góðkendar. Her hugsi eg eitt nú um minstukrøvini, sum hava við umstøðurnar hjá spælarunum og áskoðarunum at gera, sigur Rúni Heinesen.

### Ætla sær at skifta

Tað eru tveir grasvallir í Føroyum, sum hava verið nýttir til landsdystir. Talan er um Svangaskarð og Tórsvøll. Í báðum plássum hevur møguleikin fyri at skifta grasið út við graslíkið verið uppi og vent. Nú hava fyrst FIFA og nú UEFA góðkent graslíkisvallir at spæla altjóða fótbólt á, og tí er einki at ivast í, at hesin spurningurin fer at verða viðgjørdur av nýggjum.

Í Danmark verða mest sum allir dystirnir hjá besta landsliðnum spældir í Parkini í Keypmannahavn. Formaður í nevndini fyri felagið, sum eigur Parkina, er Flemming Østergaard, sum eisini er formaður í FCK. Hann hevur áður sagt, at teir fara at skifta grasið í Parkini út við graslíkið, tá ið UEFA hevur givið grønt ljós fyri altjóða dystum á graslíki. Eftir UEFA avgerðina mikudagin segði Østergaard, at teir í Parkini fara at tosa við DBU um henda spurningin, áðrenn nakað verður gjørt.

– UEFA samtyktin er púra fesk. Enn hava vit ikki viðgjørt hetta ella tosað við nakran um tað, men hetta er heilt víst ein spurningur, sum fer at verða viðgjørdur í næstu framtíð, heldur Rúni Heinesen, sum fyri FSF hevur luttikið í norðurlendskum samstarvi um graslíkisvallir.

# GÍ liðformaðurin flytir til ÍF

**Poul Ennigarð skal næsta kappingarár aftur spæla saman við Bartali Eliasen, sum hann í fleiri ár var makkari hjá í GÍ miðverjuni**

ÍF FYRIREIKING
*Jóannes Hansen*



*Liðskiparin hjá GÍ verður at síggja á liðnum hjá ÍF næsta ár*

Fótbóltsspælarar í Gøtu halda seg til GÍ, um teir ikki flyta av landinum at spæla fótbólt. Tað er ikki meiri enn tvær vikur síðani, at GÍ leiðslan staðfesti hetta her á síðunum. Undantøk finnast alla staðni plagar at verða tikið til, og soleiðis tykist tað eisini at vera í hesum førinum.

Týsdagin skrivaðu ÍF og Poul Ennigarð undir samstarvsavtalu. Avtalan ber við sær, at Poul Ennigarð næsta kappingarár flytir inn um Varmakeldueið. Hann fer úr gulu GÍ troyggjuni og letur seg í reyðu ÍF troyggjuna.

– Vit eru sera fegnir um at hava fingið Poul at spæla við okkum. Tað rokna vit sum góðan styrk. Poul hevur drúgvar royndir í bestu deildini, og tað hevur sjálvsagt talt við, tá ið vit hava gjørt avtalu við Poul, at hann bæði hevur verið drúgvur og hollur í bestu deildini í so mong ár, verður sagt úr ÍF.

Poul Ennigarð er 27 ára gamalur, og hann hevur seinasta árið verið liðformaður í Gøtu. Síðani 1994 hevur hann verið fastur fúsur á besta GÍ liðnum undantikið skiftini, tá ið hann hevur verið á flatlondum í útbúgvingarørindum, og tá ið hann hevur verið skaddur.

Í fleiri ár spældu Poul Ennigarð og Bartal Eliasen saman í GÍ miðverjuni. Undan síðsta kappingarárinum flutti Bartal aftur til Fuglafirðar, og nú verður hann aftur liðfelagi við Poul Ennigarð. Um teir báðir fara at spæla í miðverjuni verður upp til ÍF venjaran, Petur Simonsen, at gera av. Í fjør var Bartal leingi álopsspælari hjá ÍF, og Poul Ennigarð var síðsta partin av kappingarárinum høgri vongverji hjá GÍ.

Í Fuglafirði halda teir seg vera komnar undir land við manningarligu fyrireikingunum til næsta kappingarár. Málverjin, Karstin Joensen, er fluttur til Klaksvíkar og KÍ. Nýggjur málverji í Fuglafirði verður Allan Joensen. Hann hevur áður spælt í ÍF, B68 og LÍF.

Gøtumenn hava tikið til eftirtektar, at Poul Ennigarð er fluttur úr barndómsfelagnum. Tað hevur áður ljóðað, at Poul skuldi vera á veg til Fuglafirðar, men tá hevur hetta ikki verið meiri enn tos. Nú er tað veruleiki. Enn hevur einki verið at frætt, um GÍ fer at fáa nýggjan spælara í staðin fyri Poul Ennigarð.



# Johan hevur kós móti Parkini

**Føroyski landsliðsspælarin taldist millum málskjúttarnar, tá ið Horsens á heimavølli við sigri á superligufelagnum AGF spældi seg í hálvfinaluna í steypakappingini**

DANSKA STEYPAKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*


*Johan Byrial Hansen staðfestir sigurin, tá Horsens sendi AGF úr kappingini*

Tað er framvegis góður møguleiki fyri, at felagið hjá í hvussu so er einum føroyskum fótbóltsspælara verður annar parturin í donsku steypafinaluni í fótbólti, sum verður spæld í Parkini Kristi Himmalferðardag.

Mikukvøldið spældu og stríddu Horsens og Johan Byrial Hansen seg í hálvfinaluna. Tað gjørdu teir við 3-1 sigri á AGF. Hóast Horsens er oddalið í næstbestu deildini, so var tað óvæntað, at teir sigraðu. AGF er á fjórða plássinum í superliguni, men mikukvøldið megnaðu teir ikki at fáa nakað burturúr.

Johan Byrial Hansen slerdi sigurin rimmar fastan, tá ið tað restaðu tveir minuttir av hálva tímanum, sum tað var neyðugt at spæla eyka. Málið skoraði verjuspælarin í snarálopi, eftir at AGF støðugt hevði trýst fyri at javna 2-1 leiðsluna, sum Horsens hevði fingið í 112. minutti.

AGF legði seg á odda við brotssparki, sum Stig Tøfting umsetti í 1. hálvleiki. Tveir minuttir eftir steðgin javnaði Horens máverjin, Søren Jochumsen, við brotssparki. So trýsti og trýsti AGF fyri at fáa sigursmálið, men Horsens vardi væl, og teir vóru eisini hepnir. Tveir minuttir undan at vanliga leiktíðin var liðug, misti AGF ein mann, og tað varð ivaleyst avgerandi fyri endaliga úrslitið í longdu leiktíðini.

Fótbóltsliðið í Horsens hevur altíð verið nevnt Den gule fare, og tað kann ikki sigast annað, enn at Johan B. Hansen og liðfelagarnir mikukvøldið livdu upp til hetta hugtakið.

FCM vann 3-0 á útivølli móti Ølstykke, sum spælir í 1. deild. Fyri superligufelagið skoraði Mohammed Zidan tvey mál.

Tvær fjórðingsfinalur verða ikki spældar fyrrenn 6. mars. Tær eru Fremad Amager-FCK og Skjold-Brøndby. Tær vórðu ikki spældar í fyrrakvøldið, tí bæði Brøndby og FCK í gjárkvøldið skuldu spæla í nýggju norðurlendsku kappingini, Royal League.

# Hoyvíkingar skulu takast í álvara

**H71 vann mikukvøldið á Kyndli, og tað er neyvan ov nógv sagt, at teir grønu føroyameistararnir hava ein trupulleika við hoyvíkingum, tí farna kappingarár høvdu teir eisini stórar trupulleikar av H71**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


*Niels Viggo Niclasen v.m. og Piti Negru h.m. eru nú liðfelagar í H71, og mikukvøldið skoraðu teir fimm mál í part, tá ið H71 vann á føroyameistarunum úr Kyndli*

*savnsmynd*

H71 ætlar sær ikki einki í ár. Mikukvøldið var dystur millum H71 og føroyameistararnar úr Kyndli í Atlantic Airways-kappingini í Hoyvík, og hendan dystin vunnu hoyvíkingar 31-27, eftir at teir høvdu verið á odda 14-12 í steðginum.

Dysturin var sera spennandi, tí tað var ikki fyrr enn heilt móti endanum av dystinum, at hoyvíkingar fingu luft niður til kyndilsmenn. Hoyvíkingar vóru á odda tað mesta av dystinum, men leiðslan var ongantíð meiri enn eitt ella tvey. Tá ið Kyndil so satsaði móti endanum av dystinum, fekk H71 økt eitt vet um leiðsluna, og harvið settu hoyvíkingar eina tjúkka striku undir, at teir eru klárir til at verða við í stríðnum um fremstu plássini.

Toppskjútti hjá H71 var leikandi venjarin Henrik Gerster við 7 málum, meðan Halgir Dahl Olesen skeyt 6 mál. Hjá Kyndli skeyt Jakob Jónson 8 mál, meðan Josef Abrahamsen og Finnur Hansson skutu 6 mál hvør.

Við sigrinum í gjárkvøldið hevur H71 lagt seg heilt fram í oddin í Atlantic-Airways kappingini.

**H71-Kyndil 31-27 (14-12)**
**H71:** Henrik Gerster 7(1), Halgir Dahl Olesen 6, Piti Negru 5, Niels V. Niclasen 5, Høgni Joensen 3, Birgir Kass 2, Esbern Patursson 2, Kenn Failstrup 1
**Kyndil:** Jakob Jónsson 8, Finnur Hansson 6(3), Josef Abrahamsen 6, Hans Áki Dal-Christiansen 3, Rókur Akralíð 2, Janus Einar Sørensen 1, Høgni Klein 1
**Brotskøst:** H71 2(1), Kyndil 3(3)
**Útvísingar:** H71 1, Kyndil 3
**Dómarar:** Kristjan Johansen og Sámal Hansen

# Fimm fet rætta vegin

**Nú gongur rætta vegin, men enn resta Føroyar at vinna seg fýra pláss rætta vegin, áðrenn støðan undan ársskiftinum verður endurvunnin**

FIFA STYRKISLISTIN
*Jóannes Hansen*

Nú gongur tað rætta vegin á altjóða styrkislistanum fyri fótbólt. Javnleikurin á Kypros er ivaleyst høvuðsorsøkin. Undir øllum umstøðum hava Føroyar flutt seg rætta vegin á styrkislistanum, sum FIFA kunngjørdi fyrr í vikuni. Nú verða Føroyar mettar at eiga 130. besta landsliðið í heiminum. Hetta eru fimm pláss hægri enn fyri einum mánað síðani. Millum londini, sum Føroyar hava lyft seg framum, er Malta. Fyrr í summar vunnu Føroyar vinardyst móti Malta.

Enn restar nakað í, áðrenn Føroyar hava endurvunnið støðuna á styrkislistanum undan síðsta ársskifti. Tá vóru Føroyar á 126. plássunum. Tað verður eitt stórt tak at lyfta seg so høgt, men tað er heilt stutt fram til 129. plássið.

Á øllum styrkislistunum hevur Montserrat verið á 205. og aftasta plássinum. Nú hevur Montserrat lyft seg fram á 201. plássið. Aftasta plássið hevur Guam yvirtikið.

### Ísland í leysum lofti

Ovasti tindurin á styrkislistanum líkist sær sjálvum. Brasil og Frakland verða framvegis mett at eiga bestu landsliðini í heiminum. Argentina er nú nummar trý. Teir hava lyft sær tvey pláss. Síðani eru Spania (-1), Kekkia (+1), Holland (-2), England (+1), Meksiko (-1), Portugal (+9), Italia, USA og Turkaland (-4). Framgongdin hjá Portugal kemst av góðu úrslitunum hjá teimum í EM endaspælinum í summar. Europameistararnir úr Grikkalandi eru nummar seytjan. Tað er trettan pláss hægri enn fyri einum mánað síðani.

Á trettanda plássinum er Danmark fremst av Norðurlondum. Talan er um somu støðu hjá Danmark, meðan Svøríki á fimtanda plássinum er flutt fýra pláss fram. Tað er sera merkisvert, at Týskland, sum oftast hevur verið millum tey ovastu, nú er nummar sekstan.

Noreg er nummar 35 (+2), Finnland nummar 43 (+2), og Ísland er nú á 90. plássinum. Tað hevur hilnast serliga illa hjá Íslandi í landsliðsfótbólti í ár. Meðan grannarnir fyri vestan tvey tey undanfarnu árini stóðu seg so mikið væl, at tað leingi vóru møguleikar fyri, at teir skuldu kvalifisera seg til EM endaspælið, so hevur tað gingið av skriðuni í nýggju HM undankappingini, har Ísland longu hevur mist allar møguleikar. Tað sást aftur á styrkislistanum. Í desember í fjør varð Ísland mett at eiga 58. besta landsliðið í heiminum. Nú verður liðið mett at vera nummar 90 ella 32 pláss lægri enn fyri ellivu mánaðum síðani og tvey pláss lægri enn í síðsta mánað.

Føroyar eru umframt við Fraklandi í HM undankappingarbólki saman við Írlandi, sum er á 15. plássinum, Sveis 45 (-3), Ísrael 55 (+1) og Kypros, sum er nummar 105, og sum er farið fýra pláss eftir hælið síðsta mánaðin og átta pláss eftir hæli síðani í desember í fjør.